Pauli sigur einki

§-19-NEVNDIN
Ey›un Klakstein

Pauli Ellefsen, fyrrverandi løgma›ur, vil als ikki gera nakra skjóta vi›merking til kanningina hjá §-19 nevndini, sum var› almannakunngjørd í gjár.

– Eg ætli mær fyrst at lesa frágrei›ingina, á›renn eg sigi naka› um hana, sta›festir Pauli Ellefsen.

Sjálvandi ymiskar orsøkir

§19-NEVNDIN
Ey›un Klakstein

Jógvan Sundstein, sum var ein av løgmonnunum í áttatiárunum, sigur, at hann ikki er heilt samdur vi› ni›urstøv›uni hjá §-19 nevndini, men hann vil seta seg betri inn í kanningina, á›renn hann kann gera itøkiligar vi›merkingar.

– Sjálvandi róvu ta› fleiri ymiskar orsøkir til, at ta› enda›i vi› eini kreppu eftir áttatiárini, heldur fyrrverandi løgma›ur.

Hann vísir á, at §19-nevndin arbeitt seg fram til at hava eina meining um áttatiárini.

Jógvan Sundstein ætlar sær nú at seta seg betri inn í arbei›sháttin hjá nevndini, og ta› sum hon fann fram til, á›renn kemur vi› veruligum vi›merkingum um kanningina.

Atli P. Dam: Altí› lætt at vera bakklókur

-Sum stø›an sá út í áttatiárunum og vi› teim upplʼsningum, sum vit høvdu, haldi eg, at politikkararnir gjørdi teirra frægasta. Tí haldi eg, at ta› er ov sterkt at siga, at teir sviku, sigur Atli P. Dam, fyrrverandi løgma›ur minuttir eftir at drúgv frágrei›ing er lødd á bor›i› um m.a. føroyskan politikk í áttatiárunum.

POLITIKKUR
Jústinus Leivsson
Eidesgaard

Vit áttu tríggjan løgmemm í áttatiárunum Paula Ellefsen, Atla P. Dam og Jógvan Sundstein. Teirra virksemi er fínkembt í eini drúgvari kanning, sum grein 19 nevndin hevur gjørt um stʼringina av Føroyum í áttati árunum. Atli P. Dam er ein av teimum politikkarum, sum standa fyri skotum í ni›urstø›uni hjá grein 19 nevndini.

Atli P. Dam sat sum løgma›ur í tí›arskei›inum 1985-89.

Vit hittu Atla P. Dam, beint eftir at nevndin hev›i lagt frágrei›ingina fram og hann hev›i hug at bí›a vi› veruligum vi›merkingum til hann hev›i lisi› frágrei›ingina, sum telir heilar 600 sí›ur. Men hann hev›i nakrar vi›merkingar til sjálva ni›urstø›una.

Sviku ikki

– Vi› teimum fortreytum, sum politikkararnir høvdu til at taka stø›u útfrá, ta› vil siga ítøkiligum hagfrø›isligum upplʼsingum, ítøkiligum upplʼsingum frá eini undirmanna›a›ari umsiting, sum løgtingi› ógvuliga trey›ugt veitt játtani til, so gjørdu politikkararnir teirra frægasta. Tí haldi eg, at ta› er sterkt sagt, at teir sviku, men lætt er altí› at eftirrationalisera, sigur Atli P. Dam.

-Ni›urstø›an

Atli Dam sat vi› ró›ri› eitt heilt valskei› í áttatiárunum

nevnir at gó› rá› vór›u givin, men hvørji róvu hesi? E itt nú søgdu bankarnir ósatt vi›víkjandi innlánunum og skattaspekulatión f fyri myndugleikunum vi› so óteljandi orsøkum sum sigast samvitska, er torført at síggja, at ein yvirordna› sonn mynd kundi fáast til vega. Í hvussu er ikki so sonn, at vit sum einasta samfelag í Nor›anlondum kundi sloppi› undan. Vit mugu minnast til, at bankaskipanin fór um koll í Noregi, Svøríki og Finlandi seinast í áttatiárunum, me›an okkara fór í nítiárunum.

Olofson á uppbo ›

Listarverk eftir kendar føroyingar endar á uppbo›i í Klaksvík um eina viku

LIST
Ey›un Klakstein

Mánadagin letur ein óvanlig listaframsʼning upp í Klaksvík. Tí hóast verk eftir onkarar kendar listarmenn eru vi› á framsʼningini, er meginparturin av málningunum gjørdur av fólki, sum vanliga ikki fáast vi› málningalist.

Millum tey næstan 40 nøvnini, sum eru vi› á framsʼningini, eru Jógvan vi› Keldu, Leivur Hansen, Petur O. K. Olofson, Karl Martin Samuelsen, Óli Breckmann og Niels Pauli Danielsen.

Harafturat hava fleiri kendir og minni kendir føroyingar gjørt eitt listaverk til framsʼningina.

Ta› er Lions Club í Klaksvík, sum stendur fyri framsʼningini, sum er ein li›ur í royndini hjá felagnum at savna pengar til vælgerandi endamál í nor›oyggjum.

Fólk kunnu bjó›a



Hákun Dam, forma›ur í Lions Club í Klaksvík, vísir fram tvey av listaverkunum, sum ver›a vi› á uppbo›ssøluni um eina viku. Hesi hava borgarstjórarnir í Klaksvík og í Havn gjørt.
Mynd: TS

Framsʼningin letur upp í hølinum hjá Nor›oya Fornminnafelag mánadagin klokkan 16.00. Framsʼningin er opin allar gerandisdagarnar í næstu viku frá klokkan 16.00 til 20.00.

Leygardagin ver›ur framsʼningin tikin ni›ur og flutt í Ósaskúlan, har málningarnir skulu seljasta á uppbo›ssølu sunnudagin frá klokkan 15.00. Christian Olsen ver›ur uppbo›shaldari.

Um fólk ynskja at vera ónevnd í sambandi vi› uppbo›ssøluna, kunnu tey lata ein lepa inn vi› sínum bo›i á›renn uppbo›ssøluna.

Lions Club kom til Føroya í 1966, tá fyrsta deildin var› stovna› í Havn. Í 1978 var› deildin í Klaksvík stovna›.

Nógvar orsøkir til kreppuna

Hósmorgunin handa›i Lisbeth L. Petersen, forma›ur í grein-19 nevndini, løgtingsformanninum frágrei›ingina

Grein 19 nevndin hjá løgtinginum, sum hevur kanna› áttatiárini, sta›festir, at kreppan eftir áttatiárini var úrslit av einum samanspæli av ómetaliga nógvum fyritreytum

§ 19-NEVNDIN
John Johannessen

Ni›urstø›an í frágrei›ingini hjá grein 19 nevndini um áttatiárini er hvassor›a› og finnst at fleiri vi›urskiftum í áttatiárunum, sum seinni førdu til eina samfelagsliga kreppu.

Hesa frágrei›ing handa›i Lisbeth L. Petersen, sum hevur veri› forma›ur í nevndini, Finnboga Ísakson á Løgtingsskrivstovuni í gjár.

Nevndin sta›festir, at politiska lei›slan sveik, tʼandi eftirlit sveik, politiski og umsitingarligi myndugleikin var als ikki nøktandi, lurta› var› ikki eftir ávaringum frá sakkunnleikanum og gó› rá› vór›u ikki fylgd. Harafturat vísir nevndin eisini á, at peningastovnum og vinnulívinum vanta›u ney›ugt skynsemi.

Grein 19 nevndin sta›festir, at umlei› tíggju ár skuldu ganga á›renn politikarar sóu, hvussu gali› ta› var, men tá var ov seint. Samfelagsskútan sigldi á land.

Eftirliti› sveik

Umframt, at nevndin heldur, at politikarunum vanta›u rá›geving, heldur hon eisini, at eftirlitsfunktiónirnar vi› politiska myndugleikanum sviku í áttatiárunum.

Millum anna› ver›ur víst á leiklutin hjá fíggjarnevndini.

– Nógv bendir á, at fíggjarnevndin gó›tók upplʼsingar frá Landsstʼrinum um, at lógarheimild var, og at treytirnar fyri at ganga málunum á møti róvu í lagi, sigur nevndin.

– Ey›sæ› er, at Fíggjarnevndin hevur ikki havt møguleikar at gera dygdargó›a meting, hvørt verkætlanin var haldgó›, um trygdin hjá landskassanum var í lagi, og um »prógvførdi« eginpeningurin var tøkur. Men um Fíggjarnevndin skuldi vera bulverki› móti skeivum búskaparligum og umsitingarligum avger›um, tá i› talan var um stu›ulsveitingar, so tykist hon ikki at hava loyst hesa uppgávuna í áttatiárunum.

Fíggjarnevndin tykist ov sjáldan at hava sett ney›ugar spurningar til tær upplʼsingar, hon fekk, sta›festir frágrei›ingin.

Eisini er grein 19 nevndin sannførd um, at eftirliti› hjá løgtingsgrannsko›arunum sveik.

Løgtingsgransko›ararnir, sum politiskir eyglei›arar, loystu ikki sína uppgávu nóg skjótt og forsvarliga. Ábyrgdin fyri, at løgtingsgrannsko›ararnir ikki gjørdu sítt arbei›i, lá fram um alt í løgtinginum, men eisini landsstʼri› átti at gjørt løgtingi› vart vi›, at ov long tí› var gingin, ver›ur sta›fest.

Frágrei›ingin vísir umframt hetta, at landsstʼrismálanevndin, sum skuldi taka sær av og hava eftirlit vi› ger›abók landsstʼrissins, ikki røkti sína uppgávu.

Sta›fest ver›ur, at landsstʼrismálanevndin sveik sína tʼandi eftirlitsuppgávu. Frágrei›ingin vísir á, at meirilutin í landsstʼrismálanevndini gjørdi stutt av og sty›ja›i landsstʼri›, me›an minnilutin gjørdi vi›merkingar, i› ofta vóru meira politiskar enn sakligar.

Førleikin í lagi

Hóast óhepnu gongdina, heldur grein 19 nevndin ikki, at politikararnir í áttatiárunum kunnu sigast at vera verri enn teir, sum sótu frammanundan ella seinni.

Men hon heldur, at vaksandi búskapurin og vi› honum vaksandi og fjølbroyttu uppgávurnar settu krøv til politikararnar, sum teir ikki róvu førir fyri at lúka.

Nevndin vísir á, at hon vi› hesum ikki meinar, at politikarnarnir róvu ódugnaligir. Men hon er kortini sannførd um, at ta› róvu politiskir oddamenn, i› vanta›u grundleggjandi vitan um lógarverki› og búskaparligu vi›urskiftini.

Víst ver›ur á, at hetta ikki bert er naka›, sum var galdandi í Føroyum í áttatiárunum, men harafturímóti eitt vandamál, sum eisini er galdandi í útheiminum.

– Ta›, i› nevndin finnist at, er, at nógv tekin eru um, at politisku oddamenninir í Føroyum ikki altí›, heldur ikki í áttatiárunum, dugdu at brúka tey rá›ini, i› róvu til taks, sigur frágrei›ingin.

Men samstundis vísir nevndin á, at arbei›byr›an hjá embætisverkinum var so stór í mun til arbei›smegina, at ta› ikki altí› bar til at koma vi› nóg hollari rá›geving til politikararnar.

– Ey›sæ› er, at vantandi arbei›smegi setti síni mørk. Ta› var ógjørligt hjá tí einstaka málsvi›geranum at geva øllum málum nágreiniliga vi›ger›, og ikki kundi krevjast, at hann var serfrø›ingur á øllum teimum málsøkjum, hann skuldi umsita. Ta› kundi sostatt ikki ver›a kravt av einum og sama fólki, at ta› til fulnar kundi lúka førleikakrøv um lógarverk, fíggjar- og búskaparvi›urskifti, banka- og rentupolitikk, skiparakstur og so fram vegis, sigur nevndin.

Frágrei›ingin vísir á, at málsvi›geri í stórum samfelag skal umsita eina ella fáar greinar í eini lóg, ofta saman vi› ø›rum starvsfeløgum, me›an málsvi›ger›in í landsstʼrinum skuldi umsita fleiri lógir.

Nevndin er eisini sannførd um, at fyrisitingarligi førleikin ofta bleiv skerdur, tí málsvi›ger›in fór í anna› starv ella flutti til onnur málsøki, tá hann hev›i vunni› sær førleika.

Úrskur›ur nevndarinnar

Føroysku politikararnir róvu ikki nóg dugnaligir. Teir lurta›u ikki eftir ávaringum frá rá›gevum og frá embætisverkinum.

Á fleiri tʼ›andi økjum var lóggávan ógrei›, ófullfíggja› og fyrna› í áttatiárunum, og ofta á›renn komi› var í áttatiárini.

Landsumsitingin var veik. Henni vanta›i arbei›smegi, og á fleiri økjum vanta›i førleiki.

Málsvi›ger›in skuldi ofta umsita fleiri málsøki, enn hann var førur fyri. Málsvi›ger›in var ikki eins frá máli til mál - og heldur ikki nóg neyv. Tí gjørdist tapsvandin hjá landinum stórur, og munur var› gjørdur á monnum. Trupulleikar stó›ust av, at politikarar róvu partur av umsitingini.

Politiska eftirliti› - fíggjarnevnd, løgtingsgrannsko›aranevnd, landsstʼrismálanevnd - sveik. Landskassin var› bundin uttan lógarheimild.

Fylgjurnar gjørdust álvarsamar: Milliardatap hjá landskassanum og álvarsamir trupulleikar hjá einstaklingum.

Ábyrgdin fyri álvarsligu skeivleikunum og mistøkunum í áttatiárunum lá hjá politisku lei›sluni í áttatiárunum, men eisini í seksti- og sjeytiárunum, har tiltøk vór›u gjørd, i› fingu avlei›ingar í áttatiárunum og fyrstu árini í nítiárunum. Leikluturin hjá stigtakarum, rá›gevum og peningastovnum skal eisini ver›a nevndur í hesum sambandi.5

-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUTOMATIK
Skrás.: 28-06-96
Km.: 78.000
Prísur: 179.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B
Skrás.: 20-04-99
Km.: 7.000
Prísur: 119.600,- Garanti**

TOYOTA AVENSIS 2,0 T.DIESEL
Skrás.: 09-09-98
Km.: 49.000
Prísur: 178.600,- Garanti**

TOYOTA COROLLA 1,3 GALLA
Sýnaður 12-99
Skrás.: 01-05-95
Km.: 139.000
Prísur: 87.600,- Garanti*

TOYOTA AVENSIS 2,0 T.DIESEL
Skrás.: 24-04-98
Km.: 108.000
Prísur: 162.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,6 AUT. GEAR
Skrás.: 17-04-96
Km.: 62.000
Prísur: 103.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,6 LUNA
Skrás.: 27-04-99
Km.: 21.000
Prísur: 142.600,- Garanti**

TOYOTA COROLLA 1,3 GLS H/B
Skrás.: 16-10-97
Km.: 52.000
Prísur: 103.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 2,0 Gli Aut.gear
Skrás.: 13-06-96
Km.: 82.000
Prísur: 127.600,- Garanti*

TOYOTA HILUX 2,4TD 4x4 SR5
Skrás.: 28-12-99
Km.: 11.000
Prísur: 195.600,- Garanti**

TOYOTA COROLLA 1,3 Xli SEDAN
Skrás.: 31-07-97
Km.: 79.000
Prísur: 110.600,- Garanti*

VOLVO 460 SEDAN
Sýnaður 06-99
Skrás.: 25-05-90
Km.: 92.000
Prísur: 48.600,-

TOYOTA CARINA E 1,6 SEDAN
Sýnaður 03-00
Skrás.: 30-05-94
Km.: 107.000
Prísur: 98.600,- Garanti*

HONDA ACCORD 1,8
Skrás.: 01-11-97
Km.: 53.000
Prísur: 148.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 2,0 Gli
Sýnaður 03-00
Skrás.: 02-07-90
Km.: 170.000
Prísur: 65.600,-

OPEL ASTRA 1,7 TURBO DIESEL
Skrás.: 31-07-96
Km.: 105.000
Prísur: 99.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 2,0 Xli
Skrás.: 19-10-90
Km.: 122.000
Prísur: 57.600,-

FORD ESCORT 1,8 DIESEL
Skrás.: 13-12-95
Km.: 87.000
Prísur: 78.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 1,6 Xli
Sýnaður 09-00
Skrás.: 11-06-91
Km.: 108.000
Prísur: 48.600,-

FORD MONDEO 2,0 AIR-CON
Skrás.: 02-07-96
Km.: 52.000
Prísur: 120.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL
Skrás.: 26-06-96
Km.: 100.000
Prísur: 115.600,- Garanti*

FORD ESCORT 1,6
Skrás.: 22-09-95
Km.: 87.000
Prísur: 74.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 SEDAN
Skrás.: 25-02-98
Km.: 42.000
Prísur: 119.600,- Garanti**

FORD FIESTA 1,8 DIESEL
Skrás.: 27-07-93
Km.: 115.000
Prísur: 58.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B
Sýnaður 10-00
Skrás.: 29-12-98
Km.: 20.000
Prísur: 125.600,- Garanti**

AVHEINTINGARTILBOD

TOYOTA CAMRY 1,8 XL
Sýnaður 04-99
Skrás.: 30-06-88
Km.: 240.000
Prísur: 15.600,-

VØRUVOGNAR

TOYOTA DYNA 150 V/ LAST
Skrás.: 24-02-97
Km.: 100.000
Prísur: 90.600,-

TOYOTA CARINA 1,6 DX
Sýnaður 05-00
Skrás.: 09-06-87
Km.: 221.000
Prísur: 15.600,-

MAZDA B-2500 PICK-UP DIESEL
Skrás.: 11-05-00
Km.: 9.000
Prísur: 138.600,-

VW TRANSPORTER V/ DUP. KABINU
Skrás.: 17-02-87
Km.: 190.000
Prísur: 8.600,-

VW LT 35 VAN
Skrás.: 30-06-93
Prísur: 39.600,-

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-fri. 8.00-17.00
Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040
Sosialurin 218/2000